

*Articon er byrjað upp á graviarbeiðið í sambandi við ferjuleguna, sum skal gerast úti í Nólsoy til Ternuna*
Mynd: Leo Poulsen

# FARNIR UNDIR FERJULEGUNA

**Articon, ið skal gera nýggju ferjuleguna í Nólsoy til Ternuna, fóru so smátt undir arbeiðið í síðstu viku, og nú tekur tað rættiligan dyk á seg**

Leo Poulsen

- Fyribils hava vit tveir mans úti í Nólsoy at gera fyrireikandi gravingararbeiðið, men frá komandi viku verða vit fleiri mans har úti.

Tað sigur Jákup Enni, sum stendur fyri arbeiðinum hjá Articon.

Stoypast skal eitt fundament á botni, og síðani skulu fimm stálsúlur gerast, sum verða fyltar við betong. Síðani skulu betongbjálkar gerast frá grótkastinum út á stálsúlurnar, og at enda verður so dekk stoypt á saman við skráninginum, sum rampan verður løgd niður á.

- Tíðarætlanin sigur, at arbeiðið skal verða liðugt hálvan mai komandi ár, men tað er væl møguligt, at tað fer at ganga skjótari. Nú mugu vit fyrst síggja, hvørjar trupulleikar vit renna okkum í, tí tað er jú sum kunnugt ikki besta árstíðin at gera slík arbeiði í, sigur Jákup Enni.

Nakað av arbeiðinum verður gjørt hjá fyritøkuni á Hjalla, eitt nú armeringin til stoypingina, so tað verða fleiri mans enn teir, sum eru í Nólsoy, ið arbeiða upp á ferjuleguna.

- Ferðasambandið millum Havnina og Nólsoy er sera gott, so tað ber væl til hjá monnum at sigla ímillum, men vit hava tosað um at leiga eini hús har úti, tá stoypingin kemur fyri, tí tá kunnu tað gott blíva langir dagar, sigur Jákup Enni.

Í sambandi við ferjuleguna hevur Tórshavnar kommuna samtykt, at eisini eitt bíðirúm skal gerast, eins og bátabrúgvar skulu leggjast út, men hetta er ikki við í arbeiðinum, sum Articon ger.

Kommunan fekk tvey tilboð inn í innbodnari lisitatión, og har var Articon bíligast við einum tilboði á 4,2 milliónir móti metta prísinum á 4,1 millión krónur. Hitt felagið, ið bjóðaði upp á arbeiðið, var J & K Petersen, men teir lógu tvífalt so høgt, nevniliga á 8,6 milliónum krónum.

# Atlantic Airways minkar um tyrluflotan

**Tað er í høvuðsheitinum fyri at minka um íløgurnar á tyrlusíðuni, samstundis sum vit fáa ein størri flexibilitet, eins og sølan hjálpir upp á likviditetin, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways**

Leo Poulsen

Í einari børsfráboðan í gjár sigur Atlantic Airways, at felagið hevur gjørt av at selja aðra AW 139 tyrluna til Wiking Helocopters í Týskalandi.

Føroyska flogfelagið hevur samstundis tryggja sær eina optión at leiga tyrluna aftur frá týska felagnum, um tørvur verður á tí.

- Íløgurnar í tyrludeildina hava verið heldur stórar í mun til flúgviregularitetin. Vit hava hildið tað verið skilabetri at selja ta einu tyrluna við optión at leiga hana aftur, heldur enn at bundið pening í hana við óvissari arbeiðsbyrðu, sigur Magni Arge.

Atlantic Airways fer tí at konsentrera seg um flúgvingina í Føroyum við langtíðar sáttmálum.

- Tað er fyrst og fremst avtalan við tað almenna um bygdaflúgving og SAR flúgving, sum verða grundarlagið, og so hava vit møguleikan at leiga tyrluna aftur frá Wiking Helicopters um tað vísir seg, at oljuleiting verður undir Føroyum komandi ár, sigur Magni Arge.

Felagið hevur stutt sagt havt ov nógvan kapasitet til tað arbeiði, ið hevur verið.



*Við søluni av AW 139 fær Atlantic Airways størri flexibilitet og øktan likviditet, sigur Magni Arge, stjóri*

### Øskan kostar

Magni Arge sigur, at eins og hjá flestu øðrum flogfeløgum í heiminum hevur øskan úr Eyjafjallajøkli kostað Atlantic Airways nógvar pengar.

- Hálvárs roknskapurin vísti eina vend í gongdini, og vit komu út við einum lítlum undirskoti á góðar tvær milliónir. Høvdu vit havt korrigerað fyri øskuni, so hevði úrslitið verið eitt lítið avlop í staðin, sigur Magni Arge.

Tyrludeildin hevur bundið nógvar pengar, og selda tyrlan hevur verið leigað út í Hollandi, Onglandi og øðrum londum.

- Men talan hevur verið um stutt leigumál, og við søluni hava vit savnað starvsøkið í Føroyum. Við møguleikanum at leiga tyrluna aftur hava vit fingið størri flexibilitet, samstundis sum sølan merkir øktan likviditet, sigur Magni Arge.

# Miðnámsskúlin kann enda í rættinum

**Landið ætlar sær ikki at gjalda nakra eykarokning fyri umvælingarnar av Miðnámsskúlanum í Vági. Vil arbeiðstakarin ikki góðtaka hetta, endar málið helst í rættinum. Tað sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna**

Randi Jacobsen

Fleiri ferðir hevur verið frammi, at nýggi Miðnámsskúlin í Hovi hevur fleiri brek, og at fleiri av hesum brekum stava frá byggifuski.

Hesi tíðindi fingu Hergeir Nielsen, løgtingsmann at seta Helenu Dam á Neystabø, landstýriskvinnu ein fyrispurning um skúlan. Hann spurdi um brekini, hvat tey kosta at umvæla, og hvør skal gjalda.

Í svari sínum reksar Helena Dam á Neystabø upp øll brekini, sum skúlin hevur. Nøkur av teimum álvarsligastu brekunum eru, at tað hoyrist ov væl millum rúmini, galið er við innhurðum og ísetanini av vindeygum, tað lekur og luktar, og bjálvingin er ófullfíggjað.

Fleiri av hesum brekum eru ella verða umvæld fyri arbeiðstakarans rokning, og Landsverk heldur, at arbeiðstakarin skal gjalda allar umvælingarnar.

Arbeiðstakarin kom annars við 8,785 í eykarokning, men tað kravið góðtekur Landsverk ikki, og tí kann málið enda í einum gerðarrætti, svarað Helena Dam á Neystabø.